


# Pál fekk hetjumóttøku í Vági

**SVIMJIHETJA** Tá Pál Joensen kom til Suðuroyar í gjár eftir at vera komin heim eftir luttøkuna í EM kappingini, har hann vann silvur, fekk hann stórfingna móttøku

Dagfinn Olsen

Ferðin til heimbygdina Vág byrjaði á Krambatanga. Haðani fylgdu bilar og motorsúkklur honum allan vegin suður til Vágs, har fólk stóðu framvið vegnum og fagnaðu heimkomnu hetjuni, ið vann silvur í EM kappingini í svimjing 2010.

Vesturi á Eiðinum í Vági tók stór mannamúgva ímóti Páli og røðin av vágbingum, ið vildu sleppa framat at ynskja tillukku við silvurmerkinum og bragdinum, var long.

Eftir fagna og fýrverk úti, var farið innar í VB Húsið. Har vóru røður og gávuhandanir á skránni, umframt kaffi, flottar køkur og sunkist til børnini.

Marlon Kjærbo, formaður í SuSvim, handaði Páli Joensen og venjaranum Jón Bjarnason, gávu. Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági, helt røðu og handaði gávur.

Síðani helt Jon Hestoy, Svimjisamband Føroya, røðu, og síðani Jón Bjarnason. Eftir hetta handaði Eydis Kjærbo, Føroya Banki, Pál gávu. Sama gjørdi Mikkjal Sørensen, umboðani Porkeris Kommunu og Ditlev Tausen, umboðandi Hovs Kommunu.

Pápabeiggi Pál, Hans Joensen, Hans í Líðini, helt síðani røðu og endaði við væl samansettari yrking.

Síðani takkaði Pál, lítillátin sum altíð, fyri stórfingnu móttøkuna.

- Eg vóni ikki, at tað gongur ov long tíð, til eg aftur standi her, segði Pál við einum smíli.

Pál kom heim til heimstaðin og fekk virðing og kærleika at kenna. Fyri framman eru ymsar kappingar. Sum skilst, er ymiskt á skránni í november og og desember, so óivað er Pál aftur í 25 metra hylinum í Vági til venjingar skjótast til ber, meðan prátað verður um ætlanir um 50 metra hyl.

dagfinn@sosialurin.fo







## Jastrid Høj

leiðari í frískúlanum "Keldan" í Skálafirði.

***Hvussu hava teir fyrstu dagarnir verið í frískúlanum?***

- Spennandi, stuttligir og avbjóðandi. Nógv nýtt hevur verið at seta seg inn í hjá okkum øllum. Starvsfólkini eru nýggj, børnini skulu venja seg við eitt nýtt stað saman við nýggjum børnum. Men alt hetta hevur gingið sera væl og børnini virka sera hugagóð og glað.

***Hvat hendir á skúlanum beint nú?***

- Tað langa matar- og spælifríkorterið er nú. Børnini hava akkurát sitið og etið matpakka inni í lítla matarsalinum og nú eru tey á veg út at spæla. Hesin steðgurin er frá kl. 10.30-11.15.

***Klára tit á frískúlanum eisini tær fíggjarligu avbjóðingarnar?***

- Ja, tað trúgva vit uppá. Tað eru nógv sum stuðla og trúgva uppá hesa verkætlan, sum vit hava sett í verk og vónandi verða fleiri enn, sum vilja verða við.

## Í MORGIN




Fleyr til gul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

## FRÍGGJADAGIN




Fleyr til gul av útnyrðingi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 7 og 10 stiig.

## LEYGARDAGIN




Fleyr til gul av útnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar, Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Lot til andøvsgul av norði, mánadagin lækkar hann niður í vestan. Okkurt ælið sunnudagin, men yvirhøvur turt og sólglottar mánadagin. Hitin millum 10 og 14 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 986 hPa. yvir Suður-Svøríki fer eystureftir. Eitt hátrýst, 1013 hPa. sunnan fyri Ísland fer í útnyrðing.




**Komandi nátt:**
Brúgvalagið norðan fyri Føroyar fer eystureftir. Hátrýstið eystanfyri Hvarvið fer spakuliga suðureftir.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 83 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

**Hitalagið kring knøttin**

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

24. august — Fullmáni
25. august — Mánin longst frá jørðini

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. aug. | 07:56 | 20:13 | 06:56 | 19:13 | 07:11 | 19:28 | 09:56 | 22:13 | 10:56 | 23:13 | 06:11 | 18:28 | 05:11 | 17:28 | 08:11 | 20:28 | 09:11 | 21:28 | 07:41 | 19:58 | 08:56 | 21:13 |
| 26. aug. | 08:30 | 20:47 | 07:30 | 19:47 | 07:45 | 20:02 | 10:30 | 22:47 | 11:30 | 23:47 | 06:45 | 19:02 | 05:45 | 18:02 | 08:45 | 21:02 | 09:45 | 22:02 | 08:15 | 20:32 | 09:30 | 21:47 |
| 27. aug. | 09:05 | 21:22 | 08:05 | 20:22 | 08:20 | 20:37 | 11:05 | 23:22 | - | 12:05 | 07:20 | 19:37 | 06:20 | 18:37 | 09:20 | 21:37 | 10:20 | 22:37 | 08:50 | 21:07 | 10:05 | 22:22 |
| 28. aug. | 09:40 | 21:58 | 08:40 | 20:58 | 08:55 | 21:13 | 11:40 | 23:58 | 00:22 | 12:40 | 07:55 | 20:13 | 06:55 | 19:13 | 09:55 | 22:13 | 10:55 | 23:13 | 09:25 | 21:43 | 10:40 | 22:58 |
| 29. aug. | 10:17 | 22:37 | 09:17 | 21:37 | 09:32 | 21:52 | - | 12:17 | 00:58 | 13:17 | 08:32 | 20:52 | 07:32 | 19:52 | 10:32 | 22:52 | 11:32 | 23:52 | 10:02 | 22:22 | 11:17 | 23:37 |

Kelda. Álmanakkin 2010